## Súni og Atli til arbeiðis um vikuskiftið

Tveir av føroysku landsliðsspælarunum, sum mikukvøldið skulu spæla í Litava, hava spælt í donsku landskappingini um vikuskiftið. Frem spældi seinnapartin sunnudagin á heimavølli í Valby ímóti AB. Frem vann 2-1, og harvið hevði Atli Danielsen, sum var óførur sentralur miðvallari, trý stig við sær, tá ið hann í kvøld - nakrar tímar aftaná liðfeløgunum á landsliðnum - fór úr Kastrup og til Litava. Umframt stigini tiltuskaði Atli sær gult kort í dag. Súni Olsen fekk í gjár dystarvenjing á liðnum hjá AaB í 2. deild vest. Á heimavølli spældu teir ímóti Hobro, og AaB vann 4-2.

## Grikkar fulla úrtøku

Grikska U-21 landsliðið, sum mikudagin skal spæla á Svangaskarði, hevur higartil spælt tveir dystir í hesi undankappingini. Báðir hava verið ímóti Aserbadjan. Á heimavølli vann Grikkaland 4-1, og fríggjakvøldið vunnu grikkar 2-0 í Aserbadjan. Tað verður roknað við, at Aserbadjan saman við Føroyum er veikasta liðið í undankappingarbólki 1.



*Kvinnurnar hjá KÍ vóru í trupulleikum, men tær vendu dystinum ímóti B36, og við javnleiki eru tær aftur á FM-kós*

*Mynd: Norðlýsið*

# KÍ kom úr havsneyð og á FM kós

**Eftir at B36 hevði verið frammanfyri við tveimum málum, skoraði Rannvá Andreasen tvey mál, og harvið er tað KÍ, sum hevur bestu FM kortini á hondini**

KÍ-B36 KVINNUR

*Jákup Mørk*

Tað hevur verið javnt og spennandi fyrr í ár, og soleiðis var tað eisini, tá ið KÍ og B36 kvinnurnar í góðveðrinum í Klaksvík leygardagin spældu og stríddust í tí, sum varð roknað at vera lyklauppgerðin um FM í kvinnufótbólti.

Úrslitið var 2-2, og harvið hevur KÍ, sum hevur vunnið FM sjey tey seinastu árini, bestu FM kortini á hondini.

Áðrenn FM spurningurin er heilt avgreiddur, skal KÍ um tvær vikur spæla ímóti GÍ í Gøtu, meðan B36 skal spæla ímóti GÍ um eina viku og ímóti AB um tvær vikur. KÍ hevur væl betri málmun enn B36, og við úrslitunum higartil í kappingini í huga bendir alt á, at tað verður nóg mikið hjá KÍ fyri at vinna FM, um tær megna at vinna í Gøtu 22. september.

### B36 tók leiðsluna

Malan á Dunga legði eftir hálvan tíma B36 á odda við brotssparki, sum Petur Reinert dømdi, tí Heidi Sevdal varð trýst niður. Eftir ein tíma økti Halltóra Joensen til 2-0, eftir at Heidi Sevdal hevði spælt hana leysa. Møguleikin spurdist burtur úr ikki serliga hepnum útspæli frá KÍ málverjanum.

Fýra minuttir eftir, at B36 hevði økt um leiðsluna, minkaði Rannvá Andreasen um munin. Olga Kristina Hansen spældi við langari sending úr vinstru málskjúttan leysan. Rannvá sneiddi úr høgru og framvið einari, áðrenn hon við vinstra beinið smekkaði bóltin í málið.

Sjey minuttir fyri leiklok skoraði KÍ til 2-2. Aftur hesa ferð var tað Rannvá Andreasen, sum var málskjútti, eftir at hon hevði tamt langa sending, runnið seg leysa og sett framvið B36 málverjanum.

**1. deild kvinnur**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. KÍ | 15 | 12-2-1 | 53-8 | +45 | 38 |
| 2. B36 | 14 | 11-2-1 | 37-9 | +28 | 35 |
| 3. GÍ | 14 | 4-3-7 | 19-35 | -16 | 15 |
| 4. EB/S | 15 | 1-5-9 | 16-45 | -29 | 8 |
| 5. AB | 14 | 1-2-11 | 16-44 | -28 | 5 |

(NSÍ hevur tikið sítt lið úr kvinnukappingini)

## KÍ er 18 mál betri

Nú tað mangla tvey umfør av kvinnukappingini, er tað rættiliga sannlíkt, at KÍ aftur vinnur 1. deild hjá kvinnum.

KÍ hevur ein dyst eftir at spæla, og B36 hevur tveir dystir eftir at spæla. KÍ og B36 hava vunnið allar dystirnar ímóti hinum liðunum í kappingini, og tí er sannlíkt at rokna við, at KÍ vunnur sín dyst ímóti GÍ, og at B36 vinnur á GÍ og AB í seinastu umførunum.

Fáa KÍ og GÍ fulla úrtøku burtur úr sínum seinastu dystum, standa liðini á jøvnum við stigum, og so verður málmunurin avgerandi fyri kappingina teirra millum. Her er støðan hjá KÍ nógv betri enn hjá B36.

KÍ hevur vunnið greitt í nógvum av sínum dystum, og tað hevur við sær, at undan seinastu dystunum er málmunurin hjá KÍ 18 mál betur enn hjá B36.

B36 skal sostatt vinna óvanliga stórar sigrar á GÍ og AB í sínum seinastu dystum, um FM-heitið skal gerast veruleiki, ella má liðið vóna, at GÍ kann taka stig frá KÍ á seinasta leikdegnum.

Seinasta umfar hjá 1. deild kvinnum verður 22. september. Tá spælir KÍ í Gøtu og B36 á Argjum.